





# **Klæði** til ungar og tilkomnar kvinnur

**Skálabúðin og Mótaskálin er tvær ymsar síður av somu søk, men tó er munur á**

**FERÐAFRÁGREIÐING**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

Skálabúðin og Mótaskálin eru handlar, ið selja klæði til kvinnur. Mótaskálin er deild hjá Skálabúðini, og er við sínum 28 árum á baki tann yngri av hesum báðum handlum, og hevur eisini klæðini til yngru kvinnurnar.

Skálabúðin er væl kendur handil í Havnini, og er handil við breiðum úrvali til tilkomnu kvinnuna.

Mótaskálin er somuleiðis væl kendur handil, og er handilsdeildin við breiða úrvalinum til yngru kvinnurnar.

Tað finnast handlar og fyritøkur, ið hava sett dám á lív og býarmynd í fleiri ættarlið, og Skálabúðin og Mótaskálin teljast millum hesar. Báðar deildirnar hava sett dám á býarmyndina í Havn í mong ár, og breiða úrvalið hevur verið til gleði og gagn í fleiri ættarlið.

## Góð merkir

Skálabúðin hevur millum onnur merkini Brantex og Kello,og eisini Esenz, ið hevur klæði til teirra, ið vilja hava størri støddir.

Mótaskálin hevur t.d. kendu merkini CC, Passage, Repeat, og St'Martins.










